# Páll Finnur Páll, Knút, Unn og Sic á asfalt



Páll Finnur Páll hava ein serligan eginleika at skriva ljótan boðskap í penum hami.

Í dag byrjaði atgongumerkjasølan til asfalt. Í hesum sambandi kunnu vit avdúka fýra av nøvnunum á risa tónleikatiltakinum í Tórsgøtu. Føroya ónærisligasti poppbólkur Páll Finnur Páll verður millum nøvnini eins og Sic, Knút Háberg Eysturstein og Unn Patursson.

Páll Finnur Páll er langt síðan vorðin fólkaogn. Bólkurin hevur eini heilt serlig evni at skriva fangandi og syngiviðvinarlig poppløg. Lagið "Forelskaður Sjónleikari" av fyrru fløguni hjá bólkinum er tað størsta popp hittið í føroyskum tónleiki seinastu nógvu árini. Á nýggju fløguni hjá bólkinum, fær rokkurin ein eitt sindur størri leiklut. Hetta klæðir tónleikinum væl. Ofta eru tekstirnir væl hinumegin tað vanliga, og ikki alt er borðbart. Eitt nú skýrdi ummælarin hjá Sosialinum fyri nøkrum árum síðan lagið "Blottarar" fyri at vera eitt lag, ið ongantíð átti at verið skrivað. Fleiri tekstir hjá teimum eru so ófantaligir, at teir ikki kunnu verða spældir í føroysku loftmiðlunum. Tað gerst so serliga langt úti, tí hesar ófantaligheitir verða bornar fram í fittum popp hami. Men Páll Finnur Páll er altíð frálíkur á konsertum. Bólkurin er stutt sagt ein av bestu føroysku tónleikabólkunum í løtuni.

## Knút Háberg Eysturstein




Sum einstaklingur gav Knút Háberg Eysturstein í 2004 frálíku fløguna Havsglóð út. Á hesi fløgu upplivdu vit lagskrivarin Knút Háberg Eysturstein. Hesin er bæði inniligur og dugnaligur. Røddin hjá Knút er heilt serlig, og hann syngur við nógvar innlivan. Afturat sær hevur hann ein flokk av sera dugnaligum tónleikarum.

Leirvíkingurin Knút byrjaði sítt tónlistarliga yrki, sum gittarleikari í bólkum sum Marigold og avleggaranum Mary's Baby. Men tað var, sum orgulleikari í Gestum, at Knút flutti seg inn í føroysku tónleikatilvitskuna. Hann hevur eisini í Marius og í einstaklingaverkætlanini hjá Peturi Pólson víst seg, sum ein sera habilan urguleikara, ið hevur átt ein stóran leiklut í heildarmyndini hjá hesum bólkum. Saman við júst Petur Pólsyni hevur Knút seinastu tíðina spælt mótmælistónleik undir navninum Tuxedo Rebels. Men á asfalt verður hann aftur at hoyra í síni egnu verkætlan.

## SIC



SIC er Føroya besti deyðmálmsbólkur. Síðan SIC skiftið út í manningini í fjør, er bólkurin vorðin alsamt betur, og eru nú ein sannur veggur av deyðsmálmi. Í Mikkjal Gaard Hansen hevur bólkurin ein tann sterkasta oddamannin í føroyskum tónleiki. Hann er tað fyri tað myrka og ráa í føroyskum tónleiki, ið Eivør er fyri tað vakra og reina.

Bólkurin hevur spælt rættiliga fitt í Føroyum seinasta árið, umframt at teir hava verið á konsertferðum í Danmark og Íslandi. Tað skilst, at bólkurin arbeiðir við fløguætlanum. Teir ætla sær næstu tíðina at royna seg í útlandinum, og verða tí ikki nógv á hoyra á føroyskum tónleikapallum. Men á asfalt hava teir játtað at luttaka.

SIC vórðu nummar trý í The Global Battle Of The Bands fjør, men tað skilst, at tað einans vóru nøkur fá stig millum SIC, Lama Sea og Marius, sum vann.

## Unn Paturson – enn eitt come back á Asfalt



Nú er nakað liðið, síðan føroyingurin hevur hoyrt nakað frá Unn Paturssson, men nú noyðast vit ikki at bíða leingi afturat. Unn hevur nevniliga savnað sær nakrar knalldugnaligar tónleikarar, og við teimum trínur hon á pallin á Asfalttiltakinum. Unn lýsir sín tónleikastíl sum eina samanrenning millum fusión og popp.

Unn er uttan iva ein av okkara fremstu songfuglum. Hon syngur sera sannførandi, og hon hevur eitt sterkt innlit í tónleikin sum verður framførdur á pallinum. Hetta gevur henni eitt stórt yvirskot til hennara framførslu..

Unn hevur áður forkelað okkum við tveimum góðum útgávum. "Gloymska Við Grape" var slóðbrótandi poppur í einum hami, sum ikki áður er hoyrdur her á landi. Síðan fór Unn at arbeiða uppá eitt meiri jassutt konsept, sum hon kallaði fyri "RUN".

